# Risa kampingtreff á Svangaskarði



Felagsskapurin camping.fo skipaði á heysti í 2009 fyri einum ordans kampingtreffi á altjóða grasvøllinum á Svangaskarði, har uml. 70 vognar vóru við. Tiltakið var soleiðis fyriskipað, at vøllurin og B68-húsið vóru karmur um tað, sum fyrifórst.

Umframt tað vanliga at vitjað inn í vognarnar hjá hvørjum øðrum og hugnan annars, var eisini fyriskipað einum felagsborðhaldið í B68-húsinum. Øll tóku mat við, sum so bleiv settur fram til øll at fáa sær av.

Til hesa hugnaløtuna spældu nakrir limir í kampingfelagnum harmoniku, so tað rungaði góður sangur til langt út á náttina. Aftur í ár hevur camping.fo sett hetta tiltakið á skránna. Frá mikudegnum 23. juni til mánadagin 28. juni verður enn einaferð skipað fyri stórum kampingtreffi á grasvøllinum á Svangaskarði. Á vøllinum er sera gott pláss, har rúmast helst allir kampingvognarnir í Føroyum.

Á Svangaskarði eru hentleikarnir av teimum allarbestu. Á økinum fæst el og vatn, og umstøður eru til at tøma rottangan. Ókeypis atgongd er bæði til wc og brúsu.

Fríggjakvøldið tann 25. juni verður tað væl umtókta felagsborðhaldið, sum er umrøtt omanfyri, har hvør kampistur kemur við sínum mati til felagsborðhaldið. Hetta vikuskiftið er eisini B68-dagur (skráin fyri dagin verður lýst seinni), men nevnast kann, at har verður ungdómsdiskotek fríggjakvøldið og dansur við Halli Joensen verður leygarkvøldið í teltinum á rennibreytini.

Kampingtreffið er bert fyri limir í camping.fo. Prísurin er kr. 130 pr. nátt fyri hvønn kampingvogn/bil, tá er alt íroknað. Hevur tú campingvogn, men ikki ert limur enn, so far inn á camping.fo og tekna teg sum lim, so kanst tú síggja treytirnar har.

*birgir@sos.fo*






Send okkum tína
**bestu uppskrift**

**MÍN BESTA UPPSKRIFT**
er teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**

Thomas Dam búnýti

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
***mrk. uppskrift***

Ella til post@sosialurin.fo.

*halt vikuskifti við Sosialinum*
VIKUSKIFTI

Sosialurin 341800